Tórshavn, tann 5. oktober 2023
J.nr. 23122/dt

## KUNNGERÐ UM SERSTAKA BYGGISAMTYKT

Við heimild í lógini um býarskipanir og byggisamtyktir (løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipan og byggisamtykt við seinni broytingum) verður við hesum uppskot til serstaka byggisamtykt fyri Eiðis kommunu framlagt til alment eftirlit.

Uppskotið til serstøku byggisamtyktina er lagt fram til almenna eftirskoðan í vanligu upplatingartíðini hjá Eiðis kommunu á kommunuskrivstovuni á Brekkuvegi 37, 470 Eiði, í tíðarskeiðinum frá tann 2. oktober 2023 til og við tann 27. oktober 2023.

Uppskotið til serstøku byggisamtyktina eisini lagt fram á heimasíðuni www.eidi.fo.

Uppskotið til serstøku byggisamtyktina verður galdandi fyri ognirnar matr. nr. 138, 336a, 39f, 22, 83d, 149, 266a, 180a, 293a, 284a, 164a, 165a, 64a, 246a, 277c, 251b, 7, 312b og 329a, Eiði.

Ætlanin við uppskotinum til serstøku byggisamtyktina er at loyva bygging av frítíðarhúsum, har fólk kunnu njóta friðin og vakra útsýnið út í Sundalagi og norður í Flógvan.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu skrivliga verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi týsdagin tann 13. november 2023.

Uppskotið til serstøku byggisamtyktina við korti sæst við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

**Djóni Thomassen, adv.**
Bøgøta 16, Postboks 164 • 110 Tórshavn • Tlf. 788400 • djoni@adv.fo • adv.fo
CVR nr. 561126

EIÐIS KOMMUNA

# Serstøk byggisamtykt fyri frítíðarhúsøkið norðanfyri Ljósá

Dagfest: **02.10.2023** – IKKI GÓÐKENT

**Ætlan við samtyktini:**
Ætlanin við hesi serstøku byggisamtyktini er, at loyva bygging av frítíðarhúsum, har fólk kunnu njóta friðin og vakra útsýnið út í Sundalagið og norður í Flógvan. Tað er umráðandi fyri Eiðis kommunu, at so mong sum gjørligt fáa part í hesum tilfeingi. Tí treytar kommunan sær rætt til, umframt niðanfyristandandi ásetingar, í hvørjum einstøkum føri at seta krøv til skap og staðseting av hvørjum einstøkum húsi, so tað er til minst møguligan ampa fyri grannar og umhvørvið.

**Stødd, hædd, vídd, skap:**
Grundøkini skulu vera í minsta lagi 400 m².
Mest loyvda hæddarvídd á húsum er 100 m².
Mest loyvda hædd á útveggjum er 3,5 m til yvirgrind og 6,5 m til mønu.
Hall á tekju skal verða 14-43 stig, (tó ikki lægri stig enn veitarin mælir til).
Tal av frítíðarhúsum á hvørjum matrikli, verður viðgjørd í hvørjum einstøkum føri, við at venda sær til teknisku deild.
Umframt frítíðarhús er loyvt at byggja eitt úthús á í mesta lagi 10 m². Úthús skulu í høvuðsheitum hava sama skap sum frítíðarhúsið, og kann vera í mesta lagi 2,8 m høg til mønu, tó skulu krøv til frástøðu og hædd framvið marki haldast.
Hæddir verða máldar frá planeringshædd, sum verður ásett av byggivaldinum.

**Litur, tilfar, staðseting:**
Hús skulu vera soleiðis vorðin og skulu setast soleiðis í landslagið, at tey lýta sum minst.
Húsini skulu klæðast við góðkendum klædningi.

**Lendistillaging:**
Verandi lendi kann tillagast við grótlagaðum stuðlaveggi, sum er í mesta 1 m høgur. Er neyðugt at tillaga lendið meira enn hetta, skal tað gerast í fleiri stigum við hóskiligum avstandi ímillum.
Uttanum økið skal vera væl frágingið.
Girðing kann setast upp, men skal ikki lýta økið og bygginga, hædd í mesta lagi 1,1 m.

**Hátún og girðingar:**
Loyvt er at gera hátún breiðasta mát út frá húsinum, skal ikki vera meira enn 4 m.
Loyvt er at gera lívdargirðingar á hvørjum stykki, upp til 5 metrar til longdar, og upp til 1,1 m høgt.
Aðrar girðingar í samband við planting kunnu vera upp til 1,1 m í hædd, og samlaða longdin upp til 20 m.

**Byggifráleikar og krøv at halda:**
Sí **BK17,** Bygningskunngerðina.

IKKI GÓÐKENT



Eiðis kommuna ◈ Brekkuvegur 37, FO 470 Eiði ◈ +298 200400 ◈ eidi@eidi.fo

**Byggiøkið:**
Tað er bert loyvt at byggja í økinum sum sæst markerað við grønum liti á kortinum til vinstru (Eisini hjálagt í størri støðd).



*Kort yvir byggiøkið (grønt) - Tekning nr. 99.1 er hjálagt, sum pdf. dagf. 18.08.2023.*

**Atkoma:**
Hvør einstakur eigari, má í samstarv við kommununa og SEV gera avtalu um íbinding í vegin oman til SEV, eigarin ber sjálvur allan kostnaðin av hesum. Íbinding og vegur skal byggjast upp á rættan hátt, tekning skal góðkennast av kommununi.
Kommunan ger onga atkomu til frítíðarhúsini.
Tað verður álagt hvørjum einstøkum húsa eigara at gera vegasamband og parkering inni á matrikulin og at gera eina ætlan fyri gongusambandi frá parkeringsplássi til frítíðarhúsi. Ætlanin skal leggjast fyri kommununa til góðkenningar.
Eigarin ber sjálvur kostnaðin fyri at gera gøturnar og at viðlíkahalda tær, uppbygging av gøtum skulu gerast á rættan hátt og skal góðkennast av kommununi.
So hvørt sum nýggj frítíðarhús koma afturat, skulu nýggju húsa eigararnir hava rætt til at nýta verandi gøtur.
Eigarin ber sjálvur kostnaðin av at gera og viðlíkahalda íbindingar og vegir inn til matrikulin.
Einki akfar skal standa á vegnum oman til SEV, eitt neyðsinnaakfar skal altíð sleppa oman til SEV, tí hetta er ein átaks vegur.

**Parkering:**
Hvørt frítíðarhús skal, í minsta lagi hava tvey parkeringspláss, sum eigarin sjálvur ger, hesi skulu vera klár at brúka, tá ið byrja verður at byggja, hesi skulu vera inni á matriklinum. Eigarin ber sjálvur kostnaðin av at gera og viðlíkahalda parkeringsplássini.



Eiðis kommuna ❋ Brekkuvegur 37, FO 470 Eiði ❋ +298 200400 ❋ eidi@eidi.fo

## Kloakk:

Eingin kommunal spillivatnsleiðing er í økinum. Men hevur kommunan eina ætlan um, at leggja tvær spillivatnsleiðingar út á streymasjógv, tá ið bygging á økinum fer fram.
Spillivatnsleiðingar fyri byggiøkið verða deildar yvir norðara øki og sunnara øki.
Hereftir skal hvør einstakur húsa eigari binda í kommunalu spillivatnsleiðingina, hon sæst á tekningini yvir økið. Eigarin ber sjálvur kostnaðin frá húsinum til spillivatnsleiðingina. Krav er at tað skal verða pláss fyri bilinum, ið tømir steptyktanga, inni á matriklinum hjá ánara.

## EL:

Tað er eingin el-veiting í økinum. SEV setir EL-skáp upp. Les mera á heilasíðuna hjá SEV.
Hvør einstakur frítíðarhús eigari syrgja fyri síni egnu el-veiting. Ætlan fyri hvussu hetta skal gerast, skal í hvørjum einstøkum føri leggjast fyri Eiðis Kommunu og SEV til góðkenningar. Eigarin ber sjálvur kostnaðin av hesum.
Loyvi skal fyriliggja, um gravast skal í vegøksl ella veg skráar.

## Vatn:

Tað er eingin vatnveiting í økinum. Vatn kann fáast fyribils frá SEV, men SEV viðlíkaheldur vatntangar og byrgingar o.s.fr. Tá ið tað hendir, er einki vatn er í fleiri mánaðar, hetta fer fram í summarhálvuni, men tað eru fleiri ár ímillum.
Tí skal hvør einstakur frítíðarhús eigari syrgja fyri síni egnu vatnveiting. Vatni skal lúka krøvini til drekkivatn, tað má eisini gerast ein ætlan fyri, at vatni verður regluliga kannað, um tað líkir krøvini til drekkivatn. Ætlan fyri hvussu hetta skal gerast, skal í hvørjum einstøkum føri leggjast fyri Eiðis Kommunu til góðkenningar. Eigarin ber sjálvur kostnaðin av hesum.
Mælt verður til, at alt frítíðarhúsøkið fær eina felags vatnveiting, við sóttreinsaðum vatni.

## Hitaskipan:

Hitaskipan skal vera av slíkum slag, at hon ikki er til ampa fyri grannarnar, í mun til óljóð og lukt, mælt verður til grøna orku.

## RUSK:

Tað verður goldið fyri rusk í tænastugjaldinum. Eigarar kunna brúka ruskplássið á Eiði.

## Tele leiðingar:

Tað er eingin telefon og internet leiðina á økinum.

## Gjøld:

Íbindingargjøld fyri: *(Gjaldið er ikki ásett enn)*
Vatn
Kloakk
Íbindingargjøldini verða endurskoðað eftir tørvi.
Tænastugjøld fyri: *(Gjaldið er ikki ásett enn)*
Vatn
Kloakk
Rusk
Tænastugjøldini verða prístalsjavnað árliga.

IKKI GÓÐKENT